# at geva tol við oljuvinnuni



*Um ólavsøkutíð verður borurin væntandi settur aftur í føroyska landgrunnin, og hesaferð er tað Statoil, sum er fyristøðufelag. Á Atlantic Supply Base í Saltangará er Eli Lassen nú í holt við at rigga støðina til virksemið*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Spennandi í summar

– Jú, eg eri ógvuliga spentur upp á boringina í summar, og sjálvur ivist eg onga løtu í, at olja er í undirgrundini hjá okkum. Tað er bara ein spurningur um at gera ein innsats fyri at finna hana, og teir møguleikarnir gerast alt betri sum frá líður – við nýggjum kunnleika og størri tekniskum førleika. Í Noregi boraðu teir eini 70 hol, áðrenn teir funnu olju, og síðan er Noreg vorðið eitt land við nógvum kolvetni.

Eli heldur, at ein oljuvinna í Føroyum hevði verið eitt gott alternativ til fiskivinnuna, men hann heldur ikki, at tað hevur verið nakar bági fyri samfelagið, at olja ikki er funnin við teimum fyrstu boringunum, sum verið hava, tvørturímóti.

– Føroyska samfelagið eigur at geva tol, og tað eiga okkara politikarar eisini.

Hann vísir á, at basaltið á føroyska landgrunninum er so hart og tjúkt at sleppa niður í gjøgnum, og tí krevur tað góðan útbúnað og nógvan pening at finna og útvinna olju undir hesum umstøðum.

– Men hetta skuldi so eisini ført við sær, at oljan ikki er sloppin at renna burtur, sigur Eli.

## Kunnleikin veksur

Hóast boringarnar á føroyska landgrunninum higartil ikki hava staðfest kolvetni í rakstrarverdum nøgdum, vísir hann á, at áhugaverdar staðfestingar longu eru gjørdar.

– Hesar staðfestingar kunnu saman við nýggjum kunnleika við seismikkskjótingum leiða tey feløg, sum í framtíðini fara at bora í føroyskum øki, fram á leið.

Hann væntar tískil, at boringin í summar í minsta lagi fer at geva okkum ein uppaftur størri kunnleika um tað, sum er í undirgrundini. Hvørt hol, sum borað verður, gevur feløgunum størri kunnleika um tað, sum er í havbotninum.

– Eg vænti ikki, at Statoil og tey feløg, sum eru saman um verkætlanina í summar, høvdu brúkt so nógvan pening upp á hetta, um tey einki væntaðu sær. Eydnast teimum at finna olju í rakstrarverdum nøgdum, verður hetta eitt stórt frambrot um allan heim við atliti til basaltið.

Hann vísir á, at nógvastaðni í heiminum hevur verið borað niður ígjøgnum basalt undir líknandi umstøðum sum í Føroyum, men í slíkum føri eru feløgini ógvuliga varin við at upplýsa um frambrotini.

– Tey vilja ikki siga so nógv um umstøðurnar og útbúnaðin annars, sigur Eli.

## Simulator-boringar

Í 2003 vitjaði Eli Lassen á einum sonevndum boriskúla í Aberdeen, har hann eitt nú sá ein borisimulator.

– Úrslitini frá seismiskum skjótingum verða lagdar á teldu, har til ber at arbeiða upplýsingarnar á ymiskum forritum.

Hann sigur, at á boriskúlanum fekk hann at vita, at tá ið BP skuldi bora í Norðsjónum, spardu teir einar 9 mió krónur við at bora í einum leigaðum simulatori fyrst.

– Tað, sum teir frammanundan høvdu sæð í simulatorinum, vísti seg at vera júst tað sama, sum hendi, tá ið teir boraðu í Norðsjónum, sigur Eli.

## Olja í Eysturoy

Hann heldur annars, at oljuútgerðarhavnin liggur væl á økinum hjá Runavíkar havn í Saltangará.

– Runavíkar kommuna hevur brúkt nógvan pening upp á oljuútgerðarhavnina og upp á økið, sum krevst til hetta virksemi.

Eli heldur, at eftir hansara tykki kundu Føroyar í framtíðini í stórum verið býttar upp soleiðis, at Suðuroyggin og Norðoyggjar í størstan mun hava fiskivinnuna, Eysturoyggin oljuvinnuna og Suðurstreymoy ferðavinnuna.

– Tó ikki soleiðis at skilja, at onnur øki í landinum ikki eisini kunnu bjóða seg fram í fiskivinnuni og ferðamannavinnuni, leggur hann aftrat.

## Um ólavsøkutíð

John Eli Olsen, stjóri í Atlantic Supply Base, sigur seg vænta, at fyristøðufelagið Statoil og hini feløgini, sum eru saman í hesum umfari, fara at seta borin í føroyska landgrunnin um ólavsøkutíð.

Hann sigur, at Atlantic Supply Base og Skipafelag Føroya eru saman um sáttmálan við oljufeløgini um útgerðarhavnina.

– Vit vænta, at virksemi í hesum umfari kemur at varða í einar tríggjar mánaðir ella so, sigur John Eli Olsen.




*Eftir at Atlantic Supply Base hevur ligið uttan virksemi í eini trý ár, eru tangarnir nú reinsaðir og testaðir*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*